## DAGSINS MEINING

# Á einari leið

Hóast tað ikki var eins stór undirtøka sum fyri fýra árum síðani, má kortini sigast, at úrslitið av 2. útbjóðing er á einari leið. Hesaferð eru 8 feløg við, í 2000 vóru tey tvífalt so nógv. Tað hevur sínar orsøkir. Eitt nú eru fleiri av feløgunum, sum vóru við í 2000 men ikki nú framvegis virkin her. Tað eru feløgini, sum hava 6 ella 9 ára loyvi. Hesi hava helst valt at steðga á og gera seg liðug við sítt arbeiði frá 1. rundu, áðrenn tey fara út í meira. Hinvegin eru nøkur nýggj feløg við, ChevronTexaco, OMV og Geysir.

Tað er greitt, at vónirnar til Gullhornið vóru í so bjartar. Kortini eru kolvetni staðfest, og tað hevur týdning fyri allan landgrunnin. Tað fær feløgini framhaldandi at trúgva uppá, at onkunstaðni á landgrunninum goyma kolvetni seg. Og fundini, sum eru gjørd á bretskum øki longur norðuri beint við markið, hava so eisini skapt nýggjar vónir. Nú verður bráddliga tosað um, at tað er als ikki óhugsandi, at tað inni á landgrunninum undir basaltinum finnast risastór olju- ella gassfelt. Tann sannroynd, at ein av høvuðsaktørunum á Atlantsmótinum sum heild sum ChevronTexaco nú er við at leita, ger, at tað verður eitt sindur hugaligari.

Bæði føroysku oljufeløgini eru við í útbjóðingini. Tað kann tykjast eitt sindur spell, at Atlants Kolvetni ikki er við í nøkrum av tyngru bólkunum. So er spurningurin um felagið hevur verið ov seint á sjóvarfallinum ella hetta er tí, at tað í fyrstu atløgu ynskir at arbeiða saman við einum minni felag fyri so seinni at kunna taka onnur stór feløg uppí ella sjálvt "farma" inn í eitt annað samtak. Hetta seinasta er væl sannlíkt, um so er at myndugleikar og onnur oljusamtøk, sum søkja um somu teigar sum Atlants Kolvetni og Geysir, meta tað vera rætt at taka hesi bæði við. Men einki er givið. Tí verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at hepnast Atlants Kolvetni at fáa onkran góðan bitan í hesi runduni. Hitt føroyska oljufelagið hevur skorað seg inn í millum Statoil, Dong og Shell og má tað sigast at koma tí væl við, nú hesi feløgini eru millum oddafeløgini á landgrunninum.

Áhugavert verður at síggja, hvat nýggja leiðslan á Oljufyrisitingini fer at fáa burtur úr telvingini um bestu plássini í 2. útbjóðing. Tí hóast feløgini helst hava søkt ymsa staðni er sannlíkt, at fleiri at umsóknunum matja hvørja aðra tvs. fleiri feløg ella samtøk ynskja uttan iva somu teigar og hesi liggja helst har norðuri og nær markinum. Umframt hesa avbjóðing skal fyrisitingin eisini gera sær tankar um, hvussu verður við boringunum í 1. rundu, um hesar skulu borast í Gullhorninum ella um tær skulu flytast og onkrar møguliga leggjast saman til at bora inni á basaltinum t.d. í verandi 9 ára loyvum, og harvið vera við til at lata dyrnar upp til myrka dýpið undir basaltinum. Eitt er hvat oljufeløgini vilja, annað er hvat myndugleikarnir meta vera best fyri Føroyar og til tess at fasthalda áhugan hjá oljufeløgunum sum heild. Aftur her verður talan um eina skilagóða javnvág, sum fyrst og fremst má hava fyri eygað upprunaliga endamálið: at tilrættaleggja soleiðis, at bestu møguleikarnir fyri at finna olju og gass verða troyttir - hvussu tað so enn verður skrúvað saman.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tak til Hvalvík og Streymnes

Gud plantede selv et træ til korsets planke. Men Gud plantede også selv et træ på det sted, hvor Hvalvík kirke ligger i dag.

Dengang da den gamle kirke var blæst omkuld i 1827, fandt man et træ, som man mente, Gud havde plantet på det sted, hvor kirken ligger i dag.

Meget tyder på, at det var Guds profeti. Hvalvík har været rammen om en stor vækkelse i slutningen af 1800-tallet, der faktisk gjorde hele Hvalvík og Streymnes til et næsten 100% kristent kirkeområde.

(Josva 21, v45 http://www.bibelselskabet.dk/danbib/web/jos/ch21/v45.htm> : ≈Ikke ét af alle de gode ord, Herren talte til Israels hus, faldt til jorden; alt gik i opfyldelse.≈)

På søndag √ første søndag i det nye kirkeår fejrer Hvalvíks ældste helt igennem trækirke 175 års jubilæum.

Og mon ikke kirken kunne fortælle meget, hvis den kunne tale? Hvad har den dog ikke været vidne til gennem de 175 år? Måske er det godt, at den ikke kan tale.

Men i hvert fald vil både min hustru Anna og jeg meget gerne sige tak for trofast opbakning til den nye danske præst, der kom ind nede syd fra på et tidspunkt, hvor kirken stod og var ≈helt rundt på gulvet≈, fordi den manglede en præst.

Den gode og hyggelige julekirke og beboerne i Hvalvík og Streymnes har rørt vore hjerter dybt.

Tak til naboer, tak til kirkegængerne, tak til missionshusfolket og tak til alle Hvalvík borgere, som jeg møder på min vej både når jeg går i kirke og når jeg går og kører andre steder hen.

**Med venlig hilsen**
**Anna og Mogens**
**Præstegården**
**Hvalvík**

# Hvørjar ætlanir hava Føroyar fyri 2005 og árini fram eftir ?

**Edmund Joensen**



Í heimspolitikki henda av og á stórlop ella skarvslop rætta vegin. Tað seinasta var tá 10 lond gjørdust limir í ES afturat teimum 15, sum vóru frammanundan. Felagskapurin rúmar nú 25 limalond við umleið 480 milliónum íbúgvum.

Slíkt má kallast ein søgulig stórhending, serliga tá hetta er hent við tí fyri eyga at skapa frið, vælferð, vernd av umhvørvi o.s.fr. Vit síggja eitt á so mangan hátt broytt og sameint Evropa við skarvslopum framá leiðini ímóti tí ætlaða málsetninginum. ES er um somu tíð eisini vorðin heimsins størti búskapur, frammanfyri bæði USA og Japan.

Noreg, Ísland og Sveits eru ikki fullir limir enn, men hesi londini hava annað beinið innanfyri við teirra EBS avtalu. EBS-samstarvið er helst tann nærmasti samstarvsformurin, sjálvstøðug lond kunnu fáa uttan at vera limir í EU.

Síðstu tíðina hava vit javnan hoyrt í fjølmiðlunum, at stórur meiriluti av norska fólkinum sambært meiningsmátingum gongur inn fyri fullum limaskapi í ES. Norðmenn hava, eftir tvær ferðir at hava sagt nei, eftir øllum at døma nú álit á at fullur limaskapur er framtíðin.

Hvar eru Føroyar í øllum hesum og hvørjar ætlanir hava føroyingar? Er nakað ES-kjak yvirhøvur? Verða t.d. gjørdar meiningsmátingar um hesi viðurskifti?

Ætla Føroyar eina tillaðingarskipan í tøttum samstarvi, á sama hátt sum Ísland og Noreg hava tað? Ætla føroyingar at fyrireika landið og íbúgvarnar til ein møguligan komandi limaskap?

Onki røkist fyri at so er. Føroyar hava eina "simpla" handilsavtalu við ES, mest lík teimum sum londini í triðja heiminum hava. Stutt sagt gevur okkara handilsavtala við ES Føroyum flestu vansarnar sum ein fullur limaskapur inniber, men ikki fyrimunirnar.

Hetta er serliga harmuligt, tá Føroyar sum partur í danska ríkinum hava fullan rætt at krevja limaskap við undantøkum, sum t.d. Áland fekk sum atland hjá Finnlandi. Hetta hevur givið Álandi veldugar fyrimunir, nógv størri, enn um teir gjørdust sjálvstøðugir limir. Áland er atland í Finska ríkinum á sama hátt sum Føroyar eru atland í danska ríkinum. Hetta er ein rættur, sum bíðar eftir at vit føroyingar taka okkum saman - ein rættur sum vit eiga framum tey suverenu londini.

Meðan londini í okkara heimsparti brynja seg til avbjóðingarnar í nýggja Evropa, so viðgerða Føroyar handissáttmalan við Ísland. Avtalan er vánaligur arvur frá undanfarnu samgongu. Løgmaður skal viðgerða avtaluna í uttanlandsnevndini og hann skipaði fyri temadegi í hesum sambandi á Hafnia í seinastu viku. Um avtaluna við Ísland kann í stuttum sigast, at hon gevur Íslandi fullan fríðhandil í Føroyum. Føroyar fáa haraftur ímóti nógv avmarkaðan handil, lítið og onki annarleiðis enn í dag - í onkrum føri verri.

Ìslendsku verjutiltøkini á fiskivinnuøkinum verða ikki broytt. Sostatt fellur allur fyrimunurin, sum skuldi verið í einum handilssáttmála Føroya vegna, á gólvið, bæði í sjálvum handilssáttmálanum og eisini í komandi komuleringini. Føroyar fáa als ikki somu treytir sum Ísland í kappingini.

*Framhald á síðu 11*


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Er Norrønufrágreiðingin frá Skipaeftirlitinum eitt sjuskverk?

**1. partur**
**Leikluturin hjá Skipaeftirlitinum**
**Eftir Anni á Hædd, løgfrøðingi**

Forsíðan á frágreiðingini avdúkar, at Skipaeftirlitið ikki kennir sína myndugleikauppgávu í kanningarmálum av hesum slagi. Í lógini um trygd á sjónum stendur í grein 13, at

*"Landsstýrismaðurin ásetir reglur um kanning av vanlukkum á sjónum, sum viðvíkja føroyskum skipum, og øðrum vanlukkum á sjónum við tilknýti til Føroyar, til tess at staðfesta vanlukkuorsøkina og til fyribyrgjan av vanlukkum, og kann, um tørvur er á tí, brúka útlendska serfrøði til tess."*

Landsstýrismaðurin hevur ikki enn ásett nakrar reglur um kanning av vanlukkum á sjónum. Sostatt hevur Skipaeftirlitið í Norrønu-málinum ikki havt nakrar reglur at arbeiða eftir annað enn tað, sum stendur skrivað í grein 13 og so sjálvandi viðmerkingarnar til grein 13, sum eru í álitinum um trygd á sjónum. Hvat er tað so, leikluturin hjá Skipaeftirlitinum er í kanningarmálum av hesum slagi?

### Staðfesta vanlukkuorsøkina

Á fyrstu síðu í frágreiðingini staðfestir Skipaeftirlitið, at teirra uppgáva er at "útvega upplýsingar um óhappið og at fáa greiðu á tilburðargongd og orsøkum". Hetta samsvarar við kanningarsetningin í grein 13 í lógini, tí tað er *orsøkin ella orsøkirnar*, sum Skipaeftirlitið skal royna at finna fram til.

### Fyribyrgja vanlukkur

Á fyrstu síðu í frágreiðingini staðfestir Skipaeftirlitið, at teirra myndugleikauppgáva eisini er at "gera tilráðingar og taka neyðug stig til at minka um vandan fyri, at tílík(*ar*) óhapp henda aftur". Men her mistekur Skipaeftirlitið seg. Uppgávan hjá Skipaeftirlitinum í kanningar-málum av hesum slagi er *ikki* at minka um vandan fyri at *Norrøna* eina aðru ferð drívur á land undir innsigling til Tórshavnar havn undir somu veðurumstøðum sum hin 15. januar 2004. Hvussu skuldi Skipaeftirlitið eisini gjørt tað? Skal Skipaeftirlitið áseta eina kunngerð um, undir hvørjum umstøðum tað ikki er tilráðiligt hjá *Norrønu* at sigla inn í Tórshavnar havn?

Lesur ein viðmerkingarnar til lógina um trygd á sjónum og altjóða reglur, sum liggja aftanfyri ásetingina, framgongur tað greitt, at orðingin "til fyribyrgjan av vanlukkum" í grein 13 sipar til eina *generella fyribyrging* av vanlukkum í alheimshøpi. Sum dømi kann nevnast ein skipsvanlukka, sum er komin fyri tí eitt nú eldfim evni eru komin í samband við onnur evni umborð. So kann ein fyri-byrging av tílíkum vanlukkum gerast, um kanningarmyndugleikin, í føroyskum høpi Skipaeftirlitið, mælir altjóða sjóvinnufelagsskapinum IMO til, at altjóða reglur verða gjørdar um, at eldfim evni ikki mugu lastast saman við onnur evni o.s.fr.

Á fyrstu síðu í frágreiðingini stendur eisini, at "Skipaeftirlitið hevur onga ávirkan á møguligar revsirættarligar- ella endurgjaldsspurningar í sambandi við óhapp". Hetta er beinleiðis ósætt. Skipaeftirlitið og varafútin hava longu alment boðað frá, at "mistøkini" hjá skiparanum ikki eru meiri álvarslig enn tað, ið kann sammetast við ein bilførara, sum koyrir og rennir á í hálku, og tí verður ikki meiri gjørt við máli. Altso er niðurstøðan hjá Skipaeftirlitinum, sum sakkønur skipamyndugleiki, og varafútanum, sum ákærumyndugleiki, at "mistøkini" ikki eru nóg stór ella grov til, at málið kann fáa nakrar revsirættarligar fylgir. Júst tað, sum Skipaeftirlitið á síðu eitt sigur seg *onga ávirkan hava á*. Hinvegin, ein nýtist ikki at hava nógv ímillum oyrini fyri at finna útav, hví støðan er sum hon er. Skipaeftirlitið hevur nevniliga, við lógini um trygd á sjónum í hondini, fingið tillutað uppgávur og skyldur, sum rætt og slætt ikki eru sambæriligar við verandi fyrisitingarliga bygnað.

### Skipaeftirlitið sum góðkenningarmyndug leiki

Skipaeftirlitið hevur sambært lógini um trygd á sjónum uppgávur sum góðkenningarmyndugleiki. Grein 17 í lógini staðfestir, at "Skipaeftirlitið góðkennir brúk av skipum, undir hesum siglingarøki og ferðamannatal v.m., og veitir neyðug loyvisbrøv og onnur próvskjøl í hesum sambandi."

Í Norrønu-málinum merkir hetta, at Skipaeftirlitið hevur góðkent nýggju Norrønu sum skip við allari útgerð umborð, eisini Voyage Data Recorder, ella "svarta kassan". Sum øllum kunnugt, hevur Skipaeftirlitið í Norrønu-málinum avdúkað, at teir hava góðkent eina lógarásetta skipan, sum teir ikki sjálvir hava fakligan førleika og vitan um. Tí blivu dáturnar og upplýsingarnar í svarta kassanum ikki goymdar.

### Skipaeftirlitið sum eftirlitsmyndugleiki

Fremsta uppgávan hjá Skipaeftirlitinum er, sum navnið eisini sigur, eftirlitsuppgávan. Sambært grein 2, stk. 4 er ásett, at "Skipaeftirlitið umsitur lógina og hevur umsjón við, at lógin eins og reglur, boð og forboð, givin sambært lógini, verða hildin, jbr. tó stk. 3" sum ásetur, at "Landsstýrismaðurin kann í serstøkum førum leggja sínar heimildir sambært lógini til aðrar almennar myndugleikar enn Skipaeftirlitið at fyrisita." Henda heimild er tó ikki brúkt í sambandi við kanningarmál.

Sostatt er tað uppgávan hjá Skipaeftirlitinum at fylgja við í, at øll skip undir føroyskum flaggi lúka krøvini í skipalóggávuni. Skipaeftirlitið kann útinna sínar eftirlitsuppgávur á ymiskan hátt. Mest vanligi hættirnir at fremja eftirlit uppá eru ófráboðaði eftirlit og fráboðað eftirlit, sum ikki hava samband við óhapp ella vanlukkur. Ein annar háttur at fremja eftirlit er at fara umborð á skip *aftaná* at eitt óhapp er hent.

Í Norrønu-málinum er tað júst tað seinna sum er he-nt. Skipaeftirlitið fór umborð sama dag sum óhappið hendi sum "eftirlits-myndugleiki", men *konverteraði* seinni til at virka sum kanningarmyndugleiki.

### Skipaeftirlitið sum serkønur og tilmælandi myndugleiki í revsirættarligum spurningum

Sambært lógini um trygd á sjónum er tað Skipaeftirlitið, sum hevur fingið nærum allar heimildir eftir lógini. Hetta merkir, at í revsirættarligum spurningum er Skipaeftirlitið einasti føroyski myndugleiki, sum kann úttala seg um lóggávan er hildin ella brotin. Altso er Skipaeftirlitið einasti *serkøni myndugleiki*, sum hevur heimild til at meta og úttala seg um, um brot eru framd á lóggávuna ella ikki. Í veruleikanum hevur Skipaeftirlitið, sum sonevndur serkønur myndugleiki, *skyldu* til at taka revsirættarliga spurningin upp.

### Skipaeftirlitið sum kanningarmyndugleiki

Í Norrønu-málinum hevur Skipaeftirlitið, sambært sær sjálvum, virka sum kanningarmyndugleiki við heimild í grein 13 í lógini. Sum fyrr nevnt, er uppgávan hjá Skipaeftirlitinum, sum *kanningar-myndugleiki*, at kanna og staðfesta orsøkina ella orsøkirnar til, at eitt óhapp er komið fyri - og bara tað. Spurnartekin verður sett við, um Skipaeftirlitið í sínum kanningararbeiði, sínari málsviðgerð og niðurstøðum *bert* hevur fyrihildið seg til málið sum *kanningarmyndugleiki?*

Fyri at so skal vera, mugu almennu Føroyar hava álit á, at Skipaeftirlitið, líka síðani 15. januar og fram til 22. november í ár, í øllum viðurskiftum viðvíkjandi Norrønu-málinum hevur minst til at leggja sín *góðkenningarkasjett, eftirlitskasjett og sín kasjett sum serkønur og tilmælandi myndugleiki í revsirættarligum spurningum* frá sær og bara "hatta" seg undir kanningarkasjettinum.

Les frágreiðingina á www.fma.fo og met sjálv/ur.

Í næsta parti verður kanningararbeiðið og upplýsingargrundarlagið í Norrønu-frágreiðingini viðgjørt.

*Framhald av síðu 10*

Ìsland hevur dugað væl. Landið hevur ment seg ótrúliga nógv undir EBS skipanini. Búskapurin stendur nú á alt fleiri beinum. Ísland førir ein aktivan íleggingar- og bankapolitikk í útlondum við øðrum beininum í ES við EBS avtaluni.

Ìslendingar keypa seg inn í Føroyum. SMS, Skipasmiðjan, Snodd o.s.f. Ìslendsk fyritøka hevur boðað frá sera aktivum virksemi í sambandi við flogfersluna í føroyum. Ì Danmark er Magasin keypt av íslandskum íleggjara. FIH, Finansieringsinstituttet for industri og handverk í Danmark, eiga teir eisini. Sanniliga er munur á monnum. Íslandskir politikkarar smaðast ikki fyri at seta verjutiltøk fyri teirra egnu fiskivinnu og teirra egna ídna.

Svøríki, sum í nýggjari tíð hevur verið kent fyri at standa øksl móti øksl við stórídnaðin, hevur boða frá sama politikki. Stjórnin er til reiðar at brúka meira enn 10 milliardir kr. til tiltøk sum kunnu gera at Svøríkið vinnur kappingina, t.d. soleiðis at Saab verksmiðjan verður verðandi í Svøríki.

Danski forsætisráðharrin Anders Foog Rasmussen legði nú sunnudagin fram á landsfundinum krystalklára ætlan og startegi um, hvussu Danmark ætlar at leggja tilrættis. Hvussu gerast skal fyri at Danmark skal hava tað besta kappingarføri og vinna í kappingini alla tíðina.

Hvat gera vit í Føroyum? Tá hendan samgongan tók við, vóru seks ár av dýrabarari tíð burturspilt av loysingarsamgongum. Seks ár, sum blivu brúkt til klandur og stríð. Sjávlfylgiligheitir blivu gjørd til stórmál og stríðsmál, og sjálvandi kom onki burtur úr Føroya vegna. Seks ár sum (um hildið varð fram við framburspolitikkinum hjá landstýrinum frá 94-98), trygt høvdu sett Føroyar á vinnarabreytina saman við grannalondunum Íslandi og Noregi.

Løgið at Búskaparráðið ikki sær tær stóru linjurnar - ikki sær tær stóru avlaðingar og avleiðingar og tað trongu spennitroyggjuna, sum føroyskt vinnilív livir undir samanborið við grannarnar, tá um handilsavtalur ræður. Eisini er tað sera løgið at ráðið leggur so stóran dent á privatisering av Fiskavirking, einasta felag sum hevur eitt konsept og sum er ført fyri at taka kappingina upp við útlandið. Einasta føroyska felag sum út frá tosinum millum fiskimenn heldur fiskaprísinum uppi.

Vit føroyingar - hvat gera vit, nú vit er sloppin av við loysingarsamgongurnar og nú vit reypa av at hava eina stóra og sterka samgongu. Hvørjar ætlaninr hava vit fyri 2005 og árini fram eftir. Átti landstýrið og stóra sterka samgongan ikki at sett út í kortið og at gjørt nakað ítøkiligt og munagóð tiltøk, sum kundu flutt Føroyar fram á leiðnini.

Eitt er vist - tað kann ikki góðtakast, at meðan grannarnir og Europa gera skarvslop fram eftir, so skvamblar okkara sterka landstýri og okkara stóra sterka samgonga uttan mál og mið runt í egnum dunnuhyli. Her má vend koma í..

Føroyar hava brúk fyri strategiskum og ítøkiligum ætlanum fyri 2005 og árini fram eftir.